# Ársaðalfundur

Ársaðalfundur felagsins og eftirlønargrunnsins verða leygardagin hin 28.mars kl. 15 á Hotel Føroyum.

**Skráin fyri aðalfund felagsins**

1. Frágreiðing frá farna árið.
2. Val av formanni. Bert eitt uppskot er til formannsvalevni og er tað sitandi formaður Hans Joensen. Tískil verður formaðurin valdur uttan atkvøðugreiðslu
3. Framløga av roknskapi til góðkenningar
4. Val av 2 nevndarlimum og 2 tiltakslimum
5. Val av grannskoðara
6. Ymiskt.

**Skráin fyri aðalfund eftirlønargrunnsins**

1. Frágreiðing um virkið grunnsins í farna árið
2. Framløga av roknskapi til góðkenningar
3. Val av 1 nevndarlimi
4. Val av grannskoðara
5. Viðtøkubroytingar.
   Skotið verður upp, at viðtøkurnar verða broyttar, soleiðis at limakonti verða stovnaðar sum ein partur av eginognini og at, umframt at reglur verða gjørdar, sum heimilar grunninum at rinda inngjald aftur til persónar, sum varandi flyta av landinum.
6. Ymist

Aftaná fundirnar verður døgurði.

Bussur koyrir frá Steinatúni 20 min. áðrenn fundin til hotellið og oman aftaná fundin

Møtið fjøllment

**Nevndirnar**



sansir.fo

# AÐALSTJÓRI TIL ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Aðalstjórin verður ovasti ráðgevi hjá landsstýriskvinnuni í almannamálum og fer at hava ábyrgdina av dagligu leiðsluni, menningini og rakstrinum av Almannamálaráðnum. Økið fevnir um: almannamál, familjumál og bústaðarmál.

**Høvuðsuppgávur:**

· Leiða og samskipa arbeiðið í ráðnum
· Samskipa og fyrireika uppgávur í omanfyri nevndu málum
· Fyrireika lógir, kunngerðir og reglugerðir innan virkisøkið
· Eftirlit við stovnum undir Almannamálaráðnum
· Aðrar viðkomandi uppgávur, sum hoyra virkisøkinum til

**Førleikakrøv**

Kravt verður, at umsøkjarin hevur kandidatútbúgving frá lærdum háskúla og leiðsluroyndir frá tí almenna ella privata arbeiðsmarknaðinum. Umráðandi er, at tann, ið verður settur, hevur góð evni at samstarva og samskifta, umframt at seta greið mál og skapa úrslit. Viðkomandi skal duga at síggja heildir uttan at missa burtur týdningarmiklar smálutir og skal kunna arbeiða við nógvum málum í senn. Viðkomandi skal duga væl at raðfesta, samskipa og útdelegera.

Tann, ið verður settur, skal hava gott innlit í politisk viðurskifti og vitan um tær treytir, ið eru galdandi í eini politiskari fyrisiting. Týdningarmikið er, at viðkomandi hevur vilja og hegni at ganga nýggjar leiðir.

**Setanarviðurskifti**

Starvið er tænastumannastarv, starvsheitið er aðalstjóri og er flokkað í 39. lønarflokki. Harumframt er ein mánaðarlig viðbót uppá 4.763 kr. Viðbótin er ikki eftirlønargevandi. Setanarøkið fevnir um Almannamálaráðið, stovnar undir tí, Løgmansskrivstovuna og hini stjórnarráðini. Tænastustaðurin er í løtuni Almannamálaráðið.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Marjuna Hanusardóttir, løgmansstjóra, tlf. 55 10 30.

Umsóknir við upplýsingum um útbúgving, royndir og møgulig viðmæli skulu stílast til løgmann, og sendast Løgmansskrivstovuni, Marjuni Hanusardóttir, løgmansstjóra, postsmoga 64, 110 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 16. mars 2009 kl. 12. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Almannamálaráðið er eitt av stjórnarráðunum í miðfyrisitingini, sum veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika. Miðfyrisitingin er fremst í nýskapan, arbeiðslagi og samskifti. Landsstýrismaðurin í almannamálum umsitur málsøkini almannamál, familjumál og bústaðarmál.

VIT DRAGA EINA LÍNU · VIT SETA SKYNSEMI Í HÁSÆTI · VIT VILJA VITA · VIT BRÓTA SLÓÐ

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

MÁLARAMEISTARI SP/F
Niels Sørensen
TLF. 31 28 46 & 21 88 46
nielss@post.olivant.fo



# Stuðul til heilsu- og umhvørvistiltøk

Tórshavnar kommuna veitir stuðul á hvørjum ári til heilsu- og umhvørvistiltøk.

**Stuðul verður latin til verkætlanir sum:**

- Menna vitanina um heilsu og/ella umhvørvi
- Virka dálkingarfyribyrgjandi og/ella avmarkandi
- Virka orku – og tilfeingissparandi
- Kunna almenningin um heilsu- og/ella umhvørvisviðurskifti
- Verja landsløg, djóra- og/ella plantusløg

Til ber hjá stovnum, virkjum, feløgum og einstaklingum at søkja um stuðul, telefon 30 20 10.

Umsóknarblað og reglugerð fáast á www.torshavn.fo ella í Snarskivuni.

Umsóknir skulu verða hjá Tórshavnar kommunu í seinasta lagi 1. apríl 2009 og skulu sendast til:

**Tórshavnar kommuna**
heilsu- og umhvørvisdeildin
Postboks 32
110 Tórshavnar kommuna

Stuðulin verður latin í umhvørvisvikuni, sum verður 4. til 10. mai 2009.

Tórshavnar kommuna

